**Um ógildan og fyribils avtøku**

- Kommunalar avgerðir, sum ikki eru í samsvari við lógina, kunnu verða ógildaðar ella tiknar av fyribils.
- Avgerðir hjá kommunustýrinum, borgarstjóranum, nevndum og kommunusamstørvum eru javntsettar í mun til hetta eftirlit.
- Avgerðir, sum eru framdar í verki, kunnu bara ógildast um:
    1. ein partur í málinum skrivliga heitir á landsstýrismannin um hetta,
    2. tað ikki eftir aðrari lóggávu er høvi til at klaga og
    3. avgerandi fyrilit, serliga til privat áhugamál, ikki tala ímóti hesum.
- Úrslitið av ógildan er, at avgerðin ongan rættarvirknað hevur fyri framtíðina.
- Hevur kommunan tikið onnur stig, grundað á eina ólógliga avgerð, t.d. gjørt eina keyps- ella søluavtalu við triðjamann, er henda avtalan tó ikki fevnd av ógildanini.
- Fyribils avtøka av einari avgerð er eitt fyribils rættartiltak. Endamálið er at fáa stundir at kanna málið og at tryggja, at avgerðin ikki verður framd í verki, soleiðis at eftirlitið verður avskorið frá at ógilda eina ólógliga avgerð.
- Treytirnar fyri fyribils avtøku eru tær somu sum til ógildan.